

# Stomi

**Hevur tú stomi? Ella kennir tú onkran, ið hevur stomi?**
**Tak tær so tíð at lesa henda faldara!**

# Hvat er stomi?

Stomi er ikki ein sjúka, men ein fylgja av eini skurðviðgerð. Stomi er eitt gjørt op á búkinum til land ella skarn—fyribils ella restina av lívinum. 1½ promille av føroyingum hava stomi—t.v.s. uml fólk. 120

Orsøkin til, at stomi verður gjørd, er m.a. krabbamein, kroniskur bruni í tarmunum ella viðfødd brek.

Stomisløg:

- Urostomi (op til urinleiðina)
- Colostomi (op til skarn — tjúkktarm)
- Ileostomi (op til skarn — tunntarm)
- Bækken-reservoir





Colostomi

# Stomiambulatoriið á G4/A3

Stomiambulatoriið er opið fyri øllum, sum skulu fáa ella hava fingið eina stomi, og avvarðandi teirra. Endamálið er at royna at minka og møguliga loysa teir trupulleikar, ið kunnu stinga seg upp í dagligdegnum.

Tveir sjúkrarøktarfrøðingar á G4/A3 hava nomið sær serkunnleika innan stomi. Tær bjóða sjúklingum og avvarðandi hjálp, ráð, undirvísing og vegleiðing.

**Ráð og vegleiðing verða givin í t.d. hesum evnum:**

- Val av posum og plátum
- Fyribyrgjan og hjálp av stomi– og húðtrupulleikum
- Upplæring í irregatión
- Samlív og seksualitetur
- Dagligdagurin eftir at hava fingið stomi
- Hvussu kemur ein víðari
- Kostur, motión og frítíð
- Arbeiði, familja og vinir



## Stomibólkurin hjá Føroya Felag Móti Krabbameini

Stomibólkurin er ein bólkur av sjálvbodnum fólki, sum hava fingið stomi, og fólki við bekken-reservoir. Hesi fólk hava fingið upplæring til at veita stuðul, vegleiðing og ráð, og at geva tær innlit í, hvussu lívið kann livast víðari við eini stomi. At tosa við onkran, sum hevur verið ígjøgnum tað sama sum ein sjálvur, er ofta ein sera góð hjálp til at koma víðari.

Tú fært samband við limirnar í bólkinum við at venda tær til Føroya Felag Móti Krabbamein á tlf. 317959, 217959 ella 217957 ella á teldupost ffk@krabbamein.fo. Sí eisini **www.krabbamein.fo.**



# Stomiambulatoriið á G4/A3

Stomiambulatoriið á G4/A3 er opið mikudag millum kl. 13 -15
Ringjast kann beinleiðis á tlf. nr. 304599, lokal 5004 ella lokal 5003, ella á fartelefon 227662 ella 234555

Ikki er neyðugt við læknaávísing. Tó er best at avtala eina tíð.

SJÚKRAHÚS
VERKIÐ